# Kunna um útbúgvingar í Aberdeen

TÍÐINDASKRIV
*frá Altjóða Skrivstovuni*

Í sambandi við skotsku vikuna í Havn koma umboð fyri ymsar síður av skotska samfelagnum til Føroya at kunna um Skotland og hvat skotar hava at bjóða og um samstarvsmøguleikar, sum kunnu verða til gagns fyri báðar partar.

Á útbúgvingarøkinum vitja m.o. Jan Flint, Director of Corporate Affairs á Robert Gordon University í Aberdeen og Shona Malcolm, Student Recruitment Officer frá University of Aberdeen.

Tey vitja m.a. á torginum í SMS týsdag 30. sept. til kl. 14.00, tá tey fara inn á Kambsdal, har næmingar bæði á Studentaskúlanum og á Handilsskúlanum eins og onnur áhuga fáa høvi at hoyra um, hvørji spennandi tilboð hesi bæði universitetini hava at bjóða - bara ein tíma at flúgva úr Føroyum.

Hesi bæði umboðini, Jan Flint, Director of Corporate Affairs á Robert Gordon University í Aberdeen og Shona Malcolm, Student Recruitment Officer frá University of Aberdeen, vera týsdagin 30. septemb-er kl. 15.00 til umleið 16.15 at hitta í samkomu-høllini á Studentaskúlanum á Kambsdali, har tey fara at siga frá um umsóknarmanngongdina, innleiðsluskeið, bústaðarviðurskifti, undirvísingarhættir, próvtøkur o.a. Høvi verður at seta spurningar í hesum sambandi.

Afturat teimum verður eisini Martha Mýri, fyrrverandi næmingur og nú lærari við Studentaskúlan á Kambsdali, sum sjálv hevur lisið við University of Aberdeen. Hon kann eisini svara spurningum um, hvussu tað er sum føroyingur at lesa í Aberdeen.

Hesi bæði umboðini frá universitetunum í Aberdeen skulu hesar tríggjar dagarnar, tey steðga í Føroyum, eisini hitta yrkis- og lestrarvegleiðararnar í miðnámsskúlunum, umframt Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Handilsskúla í Havn og Altjóða skrivstovuna fyri at menna tann kunnleika og tað samstarv, sum longu er millum hægri lærustovnar í Føroyum og Aberdeen.

Nevndu gestir úr Aberdeen verða eisini at hitta til líknandi tiltak á Handilsskúlanum við Marknagilsvegin mikudagin 1. okt. kl. 14.45 - 15.30

Fleiri enn 50 føroyingar lesa við tey bæði universitetini í Aberdeen, antin sum fjarlesandi ella búsitandi í stórbýnum Aberdeen.

# Lýsa eftir granskingarætlanum innan fiskivinnu

TÍÐINDASKRIV
*frá Fiskivinnuroyndum*

Fiskivinnuroyndir fer undir nýggja skipan við Vinnugranskarum. Væntandi fer hetta tiltak at viðvirka til at fer kemur á menningararbeiði í fiskivinnufyritøkum.

Fiskivinnuroyndir lýsa í hesum døgum eftir umsóknum til granskingar- og menningarverkætlanir í 2004. Hesu fer er møguligt hjá fiskivinnufyritøkum á sjógvi og landi á fyrsta sinni at søkja um at fáa ein Vinnugranskara settan í eitt 3 ára skeið. Hugskotið er, at gera tað møguligt hjá fyritøkum innan fiskivinnuna á sjógvi og landi at seta fólk til at taka sær av menningaruppgávum í fyritøkuni.

Allar leiðslur liggja inni við bæði hugskotum, tankum og ætlanum - niðurskrivaðar ella ikki - um hvønn veg menningin í fyritøkuni skal fara. Men sjáldan hava leiðslurnar tíð til at arbeiða fyri at fremja hesi hugskot og ætlanir í verki. Vinnugranskaraskipanin ger hetta nú møguligt.

Vinnugranskarin verður eitt slag av menningarleiðara í fyritøkuni ella í einum samtaki av fyritøkum. Arbeiði hjá vinnugranskaranum skal hava støði í menningarætlanunum hjá fyritøkuni og liggja innan fyri raðfestu økini hjá Fiskivinnuroyndum. Arbeiðið verður bæði av vísundaligum slagi og skal verða viðkomandi fyri menningina av fyritøkuni.

Umframt vinnugranskaraskipanina hevur Fiskimálaráðið fyrr játta pening til at stovnseta granskingarkjarnar í samarbeiði við almennar stovnar. Talan er um gransking innan Fiskitøkni Lívtøkni og Virkingartøkni. Kjarnarnir eru um at fara í gongd.

Ætlanin er at Vinnugranskarnir og granskingarkjarnarnir fara at samstarva og harvið verða við til at lyfta granskingina og vinnumenningina uppá eitt hægri og meira viðkomandi støði fiskivinnuni at frama.

# Xplore 2003 kappingin verður í november

TÍÐINDASKRIV

Xplore kappingin millum miðnámsskúlanæmingar, sum eydnaðist sera væl í 2002, verður aftur í ár.

Størsta broytingin í mun til í fjør verður, at kappingin einans varir tríggir (heilar) dagar, og at byrjað verður heilt av nýggjum hvønn morgun. Í fjør vardi tiltakið tvær vikur.

Endamálið er eins og í fjør at geva luttakarunum eina grundleggjandi fatan av oljuleiting.

Evstamark fyri tilmelding er sett til 24. oktober, og í døgunum 6. og 7. november verða ætlandi framløgur um oljuleiting og Xplore á miðnámsskúlunum.

Sjálv kappingin byrjar mánadagin 10. november og endar mikudagin 12. november. Simulatiónin koyrir frá kl. 9 til kl. 15, og hugsanin er, at næmingarnir ikki gera annað enn at luttaka í Xplore hesar dagarnar.

Fyri at geva luttakarunum møguleika at læra við at gera feilir, telur fyrsta koyringin (mánadagin) einans 10%. Onnur koyring (týsdagin) telur 20%, meðan triðja koyring (mikudagin) telur 70%.

Finala verður millum fimm teir bestu bólkarnar 21. november. Vinningurin verður allarhelst 15.000 kr kontant til besta bólkin.

Arbeitt verður við at fáa luttakarar úr Aberdeen og Stavanger við hesa ferð, men tað er ikki komið uppá pláss enn.

Tiltakið verður m.a. stuðlað av oljufelagnum Eni.

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

# Skotsk vika í Havn

TÍÐINDASKRIV
*frá Tórshavnar kommunu*

Í næstu viku verður skotsk handils- og mentanarvika í Havn. Í hesum sambandi koma m.a limir í býráðnum í Aberdeen á vitjan. Jan Christiansen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu og John Reynolds, Lord Provost of the City of Aberdeen seta "Skotsku vikuna" í SMS týsdagin 30. september kl. 12.00

Fyri 10 árum síðani tók Tórshavnar býráð fyrsta stigið til at knýta tættari samband millum Aberdeen og Tórshavn. Um hetta mundið sigldi Smyril í rutu millum londini. Henda fyrsta royndin at betra um samvinnuna millum býirnar eydnaðist so mikið væl, at Tórshavnar kommuna og Aberdeen City Council fyri trimum árum síðani samdust um eina samstarvsavtalu. Avtalan hevur sum endamál, at stuðla vinnulívi og handli, at menna og víðka um samskifti á mentanar-, ítróttar- og útbúgvingarøkinum.

Eitt ítøkiligt úrslit, ið er komið burtur úr hesum samstarvi, er Grunnurin Aberdeen - Tórshavn, sum býarstýrini hvør sær hava sett pening í, og hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum kommunurnar og borgarar teirra. Í ár verður á øðrum sinni latin stuðul úr hesum grunni.

Skotska vikan er partur av einum miðvísum arbeiði seinastu árini, og hava fyrireikararnir lagt stóra orku í at gera skránna so fjølbroytta sum gjørligt, har høvuðsdenturin er lagdur á handil, vinnulív og mentan. Við í ferðalagnum, sum telur umleið 50 fólk, eru vinnulívs-, handils-, og ferðavinnufólk. Umboð fyri m.a. Aberdeen Football Club, eldraøkið og skúlaverkið. Tónleikarar og listafólk, ið virka innan ymiskar listagreinir, eru eisini við í átakinum.

Úr skránni kunnu vit m.a. nevna, at Aberdeen Maritime Museum fer at hava eina framsýning í Müllers Pakkhúsi. Frásøgufólk fer at vitja nakran skúlar í Havn við m.a. upplestri. Pensjonistar í Aberdeen verða gestir í Tilhaldinum í Tórsgøtu. Á Platform verður tónleikur og dansur, og í SMS verða tiltøk alla vikuna í vanligu upplatingartíðini hjá Sølumiðstøðini. Í Norðurlandahúsinum og Mentanarhúsinum í Fuglafirði verða tónleikatiltøk við næmingum úr Aberdeen City Music School, umfamt at sekkjapíputónleikur og tradionellur skotskur tónleikur eisini verður at hoyra ymsastaðni í høvuðsstaðnum.

"A Taste of Scotland" - Í næstu viku fara skotar enn einaferð at seta sín dám á Havnar bý. Ikki í fótbóltshýri, men við tónleiki, sangi, list, dansi, mati og whiskey.



ítróttur
Nr. 183 • leygardagur • 27. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 28.09 | FS Vágar-Skála | Lassin Isaksen |
| 28.09 | KÍ-NSÍ | Oddmar Andreasen |
| 28.09 | B36-HB | Suni Johansen |
| 28.09 | B68-GÍ | Páll Augustinussen |
| 28.09 | EB/Streymur-VB | Dagfinn Olsen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 27.09 | B68-B71 | Regin Egholm |
| 27.09 | Sumba-B36 | Niklas á Líðarenda |
| 27.09 | LÍF-ÍF | Ólavur Weihe |
| 27.09 | AB-VB | Jón Kári Frederiksen |
| 27.09 | TB-KÍ | Jóannes Michelsen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 28.09 | ÍF-GÍ | Bogi Joensen |
| 28.09 | TB-NSÍ | Eyðun Kjærbo |
| 28.09 | FS Vágar-Skála | Dan Højgaard |
| 28.09 | EB/Streymur-Royn | Georg Rasmussen |
| 28.09 | B36-HB | Hans F. Hansen |

# Rani fer frá sum talvformaður



*– Um eg skal nevna eina einstaka serliga minnisríka hending, so er tað, at vit á Norðoyastevnu í 2001 høvdu vitjan av Kasparov, sigur Rani Nolsøe, sum nú leggur frá sær sum talvforseti í Føroyum*

**Talvsambandið og Bridgesambandið hava í felag stovnað Hugaítrótt Føroya, sum skal arbeiða fyri at betra um umstøðurnar hjá telvarum og bridgespælarum**

TALVSAMBANDIÐ AÐALFUND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í dag hevur Talvsamband Føroya aðalfund. Hann verður hildin á Hotel Hafnia, og tað er greitt, at nýggjur formaður skal veljast í Talvsambandinum. Rani Nolsøe, sum hevur verið formaður seinastu fýra árini, hevur boðað frá, at hann tekur ikki við afturvali. Tað skilst, at tveir aðrir nevndarlimir – John Jacobsen, skrivari, og Martin Berg – heldur ikki taka við afturvali. Tískil skulu tríggir nýggir nevndarlimir veljast. Nevndin skipar seg sjálv.

Tíggju tey seinastu árini hava klaksvíkingar tikið sær av formanssessinum. Undan Rana var Finnbjørn Vang formaður í tvey ár, og undan honum var Jákup Mikkelsen formaður í fýra ár. Undan aðalfundinum er ikki greitt, hvør fer at verða valdur í nevndina og hvør fer at verða formaður, men Rani Nolsøe sigur, at teir hava tryggjað sær, at nevndin fer ikki at liggja ómannað. Tað eru við øðrum orðum tey, sum vilja taka avbjóðingina á seg at fyrisita føroysku telvingina.

Á aðalfundinum fer nevndin at kunna um samstarv, sum Talvsamband Føroya er farið undir saman við Bridgesambandi Føroya. Teir nevna felagsskapin Hugaítrótt Føroya, sum ætlast at hava somu uppgávu fyri hesi bæði sambondini, sum ÍSF hevur fyri ítróttarfeløgini. Rani Nolsøe sigur, at tað fyrst og fremst er fyri at gera vánirnar fyri fíggjarligum inntøkum betri, at felagsskapurin er stovnaður. Talvsamband Føroya hevur áður fingið eitt hundrað túsund krónur á fíggjarlógini. Í ár fáa teir 225 túsund krónur. Bridgesamband Føroya er í ár fyri fyrstu ferð á fíggjarlógini.

### Kasparov og gerandisdagurin

Tá ið vit spyrja Rana Nolsøe, um tað er okkurt, sum hann er serliga glaður fyri at hava verið við til tey fýra árini, sum hann hevur verið formaður í Talvsambandinum, so býtur hann svarið í tveir partar:

– Um eg skal nevna eina einstaka serliga minnisríka hending, so er tað, at vit á Norðoyastevnu í 2001 høvdu vitjan av Kasparov. Tað var fantastiskt, og hjá mær sjálvum var tað serliga áhugavert, at eg var vertur hjá honum og fylgdist við honum alla tíðina, meðan hann var her. Tað var barnadreymurin hjá øllum telvarum, sum hesar dagarnar gjørdist veruleiki hjá okkum øllum, sum fáast við telving í Føroyum.

– Harafturat vil eg siga, at tað er hugaligt, at tað tykist grógva um gangandi fót í føroyskari telving. Barnakappingar verða fyriskipaðar, og tað tykist ikki at vera trupulleiki at fáa fyrireikarar til tiltøk og kappingar, sum eru fyritreytin undir støðugari menning av føroyskari telving, og áhugin at luttaka er stórur.

Ert tú móður av nevndararbeiðnum?

– Tað hevur verið áhugavert, og eg havi kent tað sum ein forrætt at hava verið við. Eg eri ikki troyttur av telvingini – tað verði eg neyvan nakrantíð – men fyri meg eru fýra ár nóg mikið sum formaður í Talvsambandinum.

Umframt Rana Nolsøe, John Jacobsen og Martin Berg eru í nevndini Jógvan Joensen og Sámal Kristiansen. Teir standa ikki fyri valið fyrrenn næsta ár. Jógvan Næs er kappingarleiðari, og hann arbeiðir við at leggja liðkappingina til rættis. Tað plagar at verða farið undir hana um mánaðarskiftið oktober/november.

– Telvarar eru praktiskir. Teir fáa fyrst fjallgongu og fletting frá hondini, áðrenn teir fara undir landskappingina, staðfestir Rani Nolsøe.